# Wellness vælvera á Áarvegnum

Týsdagin 9. september læt ein nýggj sølu- og viðgerðarstova upp á Áarvegnum í Havn.

Talan er um Wellness.fo, sum bjóðar seg fram við kosmetologiskum produktum og viðgerðum.

Wellness.fo heldur til á Áarvegi 4, í bygninginum hjá Hotel Hafnia. Tað er Martin Brodersen saman við Elisabeth Petersen, kosmetologi, sum reka fyritøkuna.

Wellness.fo umboðar m.a. amerikanska merkið Nu Skin, ið er nakað av tí besta og mest framkomna, sum finst innan húðviðgerð. Produktini hjá Nu Skin innihalda hvørki mineralska olju ella alkohol.

Sum tað sæst í lýsing í bløðunum, er vørúrvalið og tilboðini hjá Wellness.fo rættuliga umfatandi, við kunnu nevna t.d. Galvanic Spa, Luksus Aroma Facial, Body Collection umframt ein Wellness- og fótrøktpakka, dýbdarreinsan, mýking og ryggviðgerð.

Har er nakað fyri bæði menn og kvinnur, sigur Martin Brodersen, sum leggur afturat, at til ber at tekna tey sum tekna seg sum lim í Wellness.fo við at gjalda eitt eingangsgjald upp á 141 krónur. Limirnir hava ymiskar fyrimunir og fáa t.d minst 20 prosent í avsláttri av útsøluprísunum. Møguleiki er hjá øllum at fáa eina ókeypis royndarviðgerð.

Umframt virksemið á Áarvegnum fara konsulentar frá Wellness.fo eisini at skipa fyri homeparties kring landið fyri bæði privatfólk og fyritøkur. Wellness.fo er opið: Mán.-hós. 11-17.30, frígg. 11-19 og leyg. 11-14.

mg.



*Elisabeth Petersen og Martin Brodersen í snotiligu hølunum hjá Wellness.fo á Áarvegnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri, seinnapartin nakað minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi. Mánadagin yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | -- |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 978 hPa. – HANNA – í útnyrðing úr Írlandi fer móti Íslandi og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Íslandi fer spakuliga í útnyrðing og grynnist. Brúgvalagið til Føroya fer eystureftir

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. $06^{00}$ – 10/09 $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,4° Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/08 kl. $06^{00}$ – 10/09 $06^{00}$. Avfallið higartil í september: 43 mm

javni – Virkin og virðismikil www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

7. september Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini
15. september Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. sept | 4:28 | 16:49 | 3:28 | 15:49 | 3:43 | 16:04 | 6:28 | 18:49 | 7:28 | 19:49 | 2:43 | 15:04 | 1:43 | 14:04 | 4:43 | 17:04 | 5:43 | 18:04 | 4:13 | 16:34 | 5:28 | 17:49 |
| 12. sept | 5:10 | 17:30 | 4:10 | 16:30 | 4:25 | 16:45 | 7:10 | 19:30 | 8:10 | 20:30 | 3:25 | 15:45 | 2:25 | 14:45 | 5:25 | 17:45 | 6:25 | 18:45 | 4:55 | 17:15 | 6:10 | 18:30 |
| 13. sept | 5:51 | 18:11 | 4:51 | 17:11 | 5:06 | 17:26 | 7:51 | 20:11 | 8:51 | 21:11 | 4:06 | 16:26 | 3:06 | 15:26 | 6:06 | 18:26 | 7:06 | 19:26 | 5:36 | 17:56 | 6:51 | 19:11 |
| 14. sept | 6:23 | 18:45 | 5:23 | 17:45 | 5:38 | 18:00 | 8:23 | 20:45 | 9:23 | 21:45 | 4:38 | 17:00 | 3:38 | 16:00 | 6:38 | 19:00 | 7:38 | 20:00 | 6:08 | 18:30 | 7:23 | 19:45 |
| 15. sept | 7:08 | 19:28 | 6:08 | 18:28 | 6:23 | 18:43 | 9:08 | 21:28 | 10:08 | 22:28 | 5:23 | 17:43 | 4:23 | 16:43 | 7:23 | 19:43 | 8:23 | 20:43 | 6:53 | 19:13 | 8:08 | 20:28 |